Vikuskiftis Sosialurin



**Føðingar**



25. apríl fekk Høgni eina líttlasystir. Hon var 51 cm long og vigaði 4100 gr. Foreldrini eru Fía Lindenskov og Steingrímur Funding, Valby

11. apríl fingu Beinta Joensen og Bjarni Jørgensen eina dóttur, hon var 56 cm long og vigaði 3800 gr.

29. apríl fingu Nadja Olsen og Brian í Gong, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4300 gr.

29. apríl fingu Birita og Bárður Háskor, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3300 gr.

1. mai fingu Jónrit og Søren Halling, Argir, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4100 gr.

1. mai fingu Helga og Gunnar Nattestad, Sandavágur, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4800 gr.

1. mai fingu Anja og Esbern Lervig, Thisted eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 4055 gr.

2. mai fingu Signhild Wolles og Rúni Joensen, Sørvágur, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2260 gr.

3. mai fingu Maria Jacobsen, Viðareiði og Gert Norðoy Jensen, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2900 gr.

3. mai fingu Mariann á Válinum og Gert Joensen, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 3950 gr.

4. mai fingu Leona og Kári Nilssen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4000 gr.

4. mai fingu Súsanna Leo og Mortan Bech, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4200 gr.

5. mai fingu Jóhanna Syderbø og Símun Grúkaskarð, Viðareiði, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4500 gr.

5. mai fingu Súsanna og Niels Thomsen, Strendur, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2850 gr.

5. mai fingu Annvør Jacobsen og Kim Eliassen, Fuglafirði, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3800 gr.

5. mai fingu Gunnvá Ellendersen og Ellindur Olsen, Hvalvík, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4000 gr.

5. mai fingu Pætur Hentze og Anna Maria Nilssen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3175 gr.

6. mai fingu Ella Selma og Petur Larsen, Norðragøta, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3650 gr.

6. mai fingu Katrin Hofgaard og Oddur Hentze, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3650 gr.



**60 ára føðingardagur**
Leygardagin 10. mai fyllir Harald S. Jensen, kokkur, Klaksvík, 60 ár. Dagurin verður hildin við Gráastein 8 frá kl. 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**65 ára føðingardagur**
Mikudagin 7. mai fylti Eyðfinn Jacobsen, skipari, Kambsdalur, 65 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 10. mai heima millum kl. 10 og kl. 16.

**75 ár**
Mikudagin 7. mai fylti Poul í Garði Niclasen ( Malle Poul) 75 ár. Opið hús verður leygardagin 10. mai á Vágsvegi 28, Vágur kl. 18.

**Brúdleyp**
Leygardagin 10. mai giftast í Hoyvíkar kirkju, Sunrid Isaksen, Kvívík og Martin á Borg, Hoyvík. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 18.00.

Leygardagin 10. mai 2008 giftast í Algestrup Karin Weihe, Tórshavn og Lars Egehus, Holbæk. Adr. Algestrupvej 18, 4340 Tølløse.

# Esther Djurhuus farin

Tann 4. mai andaðist Esther Djurhuus í Havn 87 ára gomul. Esther kom at sita nokk so sentralt í føroyska samfelagnum í mong ár. Hon var jú gift við Johan Djurhuus, sum var sonur Christian Djurhuus. Christian hevði ein stóran leiklut í føroysum politikki fram til fyrst í 70-unum. Hann var tingmaður í ártíggir, eins og hann var løgmaður og eisini landsstýrismaður í tilsamans 18 ár, meðan Johan var skrivstovustjóri í Landsstýrinum tey fyrsti úti við 40 árini.



Mamma Esther var Meta, hon var kend sum tanntøknari. Hon var donsk. Pápin var Knút Lützen, sum var sjómaður í mong ár. Hann var abbasonur tann fyrsta Lützen í Føroyum, Andreas Christian. Bæði hann sjálvur og hansara ætt hava havt stóran týdning fyri føroyska samfelagið. Hann var eins av teimum sum stríddust móti amtmanninum Dahlerup, og hann endaði sínar dagar sum býráðsformaður í Havn.

Tey vóru tilsamans 8 systkin tey búðu á Landavegnum, har Meta hevði klinikk. Nú eru bert tvær systrar eftir, tær búgva niðri.

Esther fór 16 ára gomul niður á studentaskúla í Viborg. Eftir lokið studentsprógv fer hon í 1939 at lesa til tannlækna. Hon er liðug longu í 1943, bert 22 ára gomul. Í Danmark hevði hon hitt Johan, sum las løgfrøði, og tey giftust. Men heim aftur sluppu tey ikki, so leingi nakað kríggj var. Esther fór tí at arbeiða sum tannlækni í Danmark.

Tá kríggið vara liðugt skundaði Esther sær heim aftur við Fagranes, sum var eitt tað fyrsta sambandið heim eftir kríggið, so hon kundi greiða familjuni frá, at nú var hon bæði gift og átti børn. Undir krígnum frættist heldur einki millum londini.

Tey flyta heim aftur, og Johan fær arbeiðið at byggja upp eina nýggja fyrisiting, eftir at vit fingu heimastýrislógina í 1948. Hetta dugdi hann væl. Meðan løgfrøði í dag mest valdast hvør ið sigur hvat, so var Johan sjálvur absolutta løgfrøðin í almennu umsitingini. Tað var eingin, sum setti spurnaðartekin við tað, sum Johan kom við.

### Tannlækni í Tinganesi

Esther fór at arbeiða sum tannlækni, og saman við Miu Trond Jensen keypti hon tannlæknastovuna hjá Kaaber, sum var í Tinganesi, á leið har løgmaður í dag heldur til. Tey fluttu haðani og í mong ár var tannlæknastovan heima hjá Miu við Hoydalsvegin.

Tá vóru ikki so nógvir tannlæknar, og tað eru ótaldar tenn, sum Esther hevur viðgjørt.

Esther setti eisini við. Tá ið eldri sonurin Kristian gjørdist tannlækni, fóru tey bæði at arbeiða saman.

Men Esther hevði nógv onnur áhugamál, sum hon fekk meira tíð at røkja, tá ið hon legði frá sær sum tannlækni. Henni dámdi væl tónleik, og hon gekk nógv til konsertir saman við vinkonum.

Hon var ein sokallað morgunfrúa, sum svam um morgnarnar í svimjihøllini.

Hon hevði eisini ein sera stóran áhuga fyri ætt, og eisini síni egnu. Hennara føroyska Lützenætt er eisini stór og sera spennandi. Vit hava altíð kenst nakað, men tað var hetta, sum kom at menna okkara kennskap. Esther hevði nógv søguligt tilfar liggjandi. Einaferð fekk eg frá henni eina maskinskrivaða frásøgn, sum abbasystir hennara Anna Evensen hevði latið úr hondum í 1927 um hennara lív. Tað vísti seg, at hetta var ikki fullfíggjað, og tað eydnaðist at fáa til vega originalmanuskriptið av einum ovastalofti í Danmark.

Hetta førdi til, at henda hugtakandi frásøgnin varð prentað í FF-blaðnum í 2003 í sjey pørtum. Her var eisini greitt frá søguni um A. C. Lützen, sum kom til Føroyar av eini tilvild, og sum gjørdist ein rættur føroyingur. Seinni gjørdist hon presta- og próstakona á Viðareiði, Hvalba og Nesi. At henda frásøgnin kom fram var serliga Esther fyri at takka. Seinni var hon eisini hent at heita á, tá talan var um ættarsøgu. Nú hevur sonurin Høgni tikið við á hesum økinum.

Esther hevði eisini nógv samband við sína ætt, sum eisini er sera stór uttanlands. Her var nógv samskifti og nógv ferðing.

Hon hevði eisini onnur sambond. Í nógv ár hevur Ása Ringberg, dóttir gamla amtmannin Hjalmar Ringberg, sum var í Føroyum undan krígnum, ferðast í Føroyum saman við dóttir síni Litten. Tær vildu ikki fara avstað aftur, uttan tær høvdu vitjað Esther, og tað gjørdu tær eisini.

Tað var í vár, at vit hittust seinastu ferð, tá hon kom til týsmorgundrekka hjá svigarinnuni Ingibjørg, kend frá Hjalmar Jacobsen. Her var hon eisini trúføst til tað síðsta.

Johan og Esther búsettust yviri við Strond. Johan fekk eitt strik, stutt eftir at hann hevði lagt frá sær, og nøkur ár seinni doyði hann. Hetta var ein stórur smeitur, serliga hjá Esther.

Tey fingu børnini Helle, Christian, Høgna og Elin. Helle býr í Danmark, meðan hini børnini búgva í Havn. Tey hava eisini verið um mammuna. Ommubørnini eru níggju í tali.

Tað verður ein saknur ikki at hitta Esther meira í býnum. Hon var altíð hugnalig og fitt.

**ó.**

## Minningarorð um

# Martin Eliasen í Beitinum, Fuglafjørður

Martin varð føddur 27. oktober 1936 og andaðist 29. august 2007.

Martin var ein sera sjáldsamur maður í nógvar mátar. Hann var ein raskur og dugnaligur maður. Millum annað var hann landari á sildaverksmiðjuni í nógv ár.

Men tað, sum eg komi at minnast og kenna hann best fyri, var at hann var røktingarmaður í mínum haga og stílaði oftani fyri fjallgongunum, tá ið eg ikki var heima.

Tað ásanna nógvir menn, at Martin var ein sera hjálpsamur maður í allar mátar. Eg veit at menn ið høvdu einar tvær ella tríggjar ær gangandi úti tá ið kavin kom um veturin og sum spurdu hann, hvar ærnar mundu liggja, tí teir ætlaðu at taka tær. Svarið frá Martin var altíð tá, hugsa tú ikki um ærnar, tí eg fari í hagan alíkavæl, so skal eg taka tær inn fyri teg. Og tær komu eisini inn. Við hesum havi eg mist ein hjálpara og góðan vin.

Eg kom at hugsa um eitt vakurt sálmavers ið Joen Poulsen, abbabeiggi mín, hevur yrkt. Og hann eiga vit øll at taka at hjartanum.

*Jesus Kristus! Far ei frá mær!*
*So eg biði nátt og dag.*
*Jesus, bróðir! Ver tú hjá mær!*
*leið meg heim mín síðsta dag.*

Friður veri við minni tínum.

**Símun P. Poulsen**